## Carlton – ein beiskur biti

Pelagiska skipið Carlton var Fiskimannafelagnum ein beiskur biti, sum formaðurin tók til í ársfrágreiðing á landsfundi í morgun. – Støðan umborð var hon, at manningin ikki orkaði ta viðferð, sum teir fingu frá reiðarínum, sum heilt opinlýst breyt sáttmálan. Reiðarin, sum í veruleikanum bara ger tað, sum norski ríkmaðurin, Kjeld Inge Røkke, gevur honum boð um, var alment frammi og segði, at hann var greiður yvir, at reiðaríið hevði brotið sáttmálan við FF. Jan Højgaard segði í morgun, at málið snúði seg bæði um sáttmálabrot og lógarbrot í fleiri førum. Málið varð tískil bæði meldað til fútan og Skipaeftirlitið. – Men til stóra undran fyri tey sum hildu, at vit hava rættartrygd í Føroyum, gjørdu hvørki fútin ella Skipaeftirlitið nakað sum helst við málið. Felagsformaðurin segði seg vóna, at slíkt ikki endurtekur seg aftur. – Málið er so upplagt, at vit ikki kunnu tapa tað í rættinum – uttan at okkurt ólógligt verður nýtt ímóti okkum, segði Jan Højgaard



# FF teknað trygging hjá ALKA

**Nevndin í Fiskimannafelagnum hevur gjørt av at teknað sína samlagstrygging hjá ALKA í Danmark og tekur soleiðis sína trygging úr LÍV**

LANDSFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í sínari ársfrágreiðing til landsfundin í dag ásannar formaðurin í Føroya Fiskimannafelag, Jan Højgaard, at árið í ár hevur verið buldrasligt hjá felagnum.

- Meðan orrustur eru, er ikki lætt at fáa sosialar skipanir at virka. Vit hava tó roynt alla tíðina, og nú sær út til, at glið er komið á eitt nú samlagstryggingina.

Jan Højgaard sigur, at seinastu 18 mánaðirnar hevur Fiskimannafelagið samráðst við trý feløg um samlagstrygging, og millum hesi er eitt danskt felag.

- Henda trygging er ikki partur av lógarkravdu tryggingini, men er ein trygging, sum FF sjálvt hevur teknað. Í nøkur ár hava vit havt samlagstrygging hjá LÍV, og hetta er tann trygging, sum hevur virkað best.

Felagsformaðurin ásannar kortini, at felagið ikki hevur verið nøgt við gjøgnumskygnið í roknskapinum hjá LÍV, har felagið kundi hugsað sær at fingið ein meira útgreinaðan roknskap.

### Trygging í ALKA

Samlagstrygging er ein trygging, ið tryggingartakarin sum oftast kann seta saman, sum viðkomandi sjálv/ur ynskir. Hinvegin verður lógarkravda tryggingin smíðað av løggávuvaldinum.

Nú hevur nevndin í Fiskimannafelagnum so gjørt av at tekna sína samlagstrygging hjá danska felagnum ALKA, har fleiri onnur føroysk fakfeløg eisini hava sína trygging.

Á landsfundinum í morgun upplýsti Jan Højgaard, at fiskimenn fara at gjalda seks krónur meira fyri hvønn mynstraðan dag á sjónum, enn teir hava gjørt áður.

- Gjaldið fer soleiðis úr 17 upp í 23 krónur um dagin, segði felagsformaðurin.



*Limirnir í Føroya Fiskimannafelag flyta nú sína samlagstrygging – úr LÍV og í ALKA*

*Mynd: Røgvi K. Mouritsen.*

**FAKTA**

Tað er fakfelagsrørslan, sum eigur tryggingarfelagið ALKA, ið hevur meira enn 100 ára royndir í sínum virksemi.
Felagið varð stovnað í 1903 av fakfelagsleiðarum og hevði tá navnið Arbejdernes Livsforsikringsselskab.
Seinni fekk felagið navnið ALKA.
ALKA er tryggingarfelagið hjá fakfelagsrørsluni, og sambært heimasíðuni eru tað felagsskapir og fyritøkur í Danmark, Svøríki og Noregi, sum eiga felagið.

# FF: Langt er á mál við eftirløn



*- Tað er ein vandi í, at fólk við góðari almennari løn og eftirløn smíða skipanir fyri láglønt við lítlari ella ongari eftirløn, segði Jan Højgaard á landsfundi í morgun*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**- Neyðugt er at taka umboð fyri láglønt við upp á ráð, tá skipanir skulu smíðast, sum láglønt eru partur av, heldur Jan Højgaard**

LANDSFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á landsfundinum í morgun ásannaði formaðurin í Føroya Fiskimannafelag, Jan Højgaard, at enn er langt á mál hjá fiskimonnum við eini nøktandi eftirløn.

- Tað hevur leingi ljóðað, at nú skal ein eftirlønarskipan skipast fyri allar føroyingar, men enn er henda skipan ikki sett í verk.

Felagsformaðurin segði seg vóna, at tey, ið smíða eina slíka skipan, hugsa um tann partin av fólkinum, sum ikki hevur eftirløn.

### Stórur vandi

Jan segði seg síggja ein stóran vanda í, at tað eru fólk, sum sjálvi sita við stórari almennari løn umframt eftirløn, sum einsamøll sita og smíða eina eftirlønarskipan fyri allar føroyingar.

- Eg hugsi um vandan, tá slík fólk mangan hava ilt við at seta seg inn í støðuna hjá lágløntum við lítlari ella ongari eftirløn.

Jan Højgaard helt, at tað hevði gagnað øllum best, um umboð fyri láglønarbólkar eisini vóru við í arbeiðnum at smíða eina eftirlønarskipan í Føroyum.